LM-088/2023

Fylgiskjal 13.

Til Løgmálráðið

Viðmerkingar til Uppskot til Løgtingslóg um fosturtøku.

Sosialráðgevarafelag Føroya (SRF) fegnast um, at hava fingið lógaruppskotið til lógtingslóg um Fosturtøku til hoyringar.

SRF tekur undir við lógartekstinum, soleiðis hann er orðaður og hevur bert hesar smávegis viðmerkingar.

Til **§ 14. Stk.** 2 stendur, at í samráðnum eru ein persónur við løgfrøðiligari ella sosialari útbúgving.

SRF hevur tað viðmerking, at tað er sera umráðandi at ein í samráðnum hevur eina sosiala útbúgving.

Viðvíkjandi viðmerkingunum til lógina pkt. 1.4.5. "mannagongd" stendur at MEGD skal kunna um álvarsligt brek.

SRF metur, at ein sosialráðgevi á Almannaverkinum eins væl eigur at kunna vegleiða kvinnuna um stuðulsmøguleikar til foreldur, ið hava børn, sum hava serligan tørv.

Til tess at stuðla undir hesar viðmerkingar skal SRF stutt vísa á hvørji vit eru og hvussu vit arbeiða:

Heildarsýnið, okkara amboð, gevur okkum eina breiða mynd av støðuni og avbjóðingunum hjá tí einstaka.

Sosialráðgevar eru serfrøðingar í breiddini og vit byggja okkara vitan á fýra fakøkir, sum eru: sosialt arbeiði, sálarfrøði, samfelagsfrøði og løgfrøði.

Fýra grundprinsippir eru í sosialráðgevarafakinum: HEKS - Heildarsýn, Etikkur, Kommunikatión og Systematikkur.

Sum sosialráðgevar hava vit førleikan og fakkunnleikan at síggja borgaran sum part av eini heild og at skilja støðuna í fleiri stigum; á mikro-, meso-, og makroniveau.

Ásannandi, at sosialráðgevarar hava breiðan kunnleika til samfelagsviðurskifti og neyðuga fakliga førleikan, fer Sosialráðgevarafelagið tí at heita á tykkum um at nágreina § 14 og viðmerkingarnar til greinina, soleiðis at tað verður positivt tilskilað, at umboðini eru sosialráðgevarar.

LM-088/2023

Vegna Sosialráðgevarfelag Føroya

Hallbjørg Lamhauge, forkvinna

Borgný Mohr, nevndarlimur

Petra Joensen, skrivari